# skipið flaggaði av bygdini



*– Tað hevði verið ein sorgarleikur, um hetta seinasta línuskipið í økinum flaggaði av bygdini, sigur Tordur J. Niclasen, borgarstjóri*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

## FAKTA UM FUGLTÚGVUNA

**Línuskip (3)**
**Smíðiár:** 1988 (Strandby, Danmark)
**Tilfar:** Stál
**Maskina:** Callesen Diesel 575 hk
**Longd:** 27,45 m.
**Breidd:** 7,50 m.
**Dýpd:** 6,05 m. (shelter dekk)
**BT:** 257,00
**Ferð:** 8 sjómíl
**Manningartal:** 14

# úpa tallerkin

### Einskiljingartos

Sum skilst, var áhugavert kjak á fundinum um ymisk vinnulívsmál, og tað skilst á øllum brøgdum, at tað kann gerast trupult hjá Bjarna Djurholm at einskilja Atlantsflog so skjótt, sum hann hevur miðjað eftir, at felagið skal einskiljast.

Tað er eingin loyna, at Tummas Arabo ikki er serliga heitur fyri fleiri av einskiljingarætlanum landsstýrisins, men á vinnulívsfundinum kom eisini fram, at heldur ikki Jóhan Dahl, løgtingsmaður, er serliga heitur fyri at einskilja Atlantsflog við tí ferð, sum landsstýrismaðurin hevur lagt upp til.

– Eg haldi, at føroyingar stúra fyri, at flogfelagið kann fara á útlendskar hendur, og tá ið hetta er lívæðrin hjá okkum úteftir, eru vit meira ansin við at lata felagið av hondum, siga okkara keldur.

### Meira opið

Keldurnar halda esini, at vinnulívsfundurin var merktur av, at fundurin ikki var almennur.

– Eingir fjølmiðlar vóru við á fundinum, og tí loyvdu fólk – og ikki minst politikarar, sær at tosa meira frá hjartanum, enn vit hoyra vanligt. Í so máta var hetta ein góður fundur, siga keldur okkara.

Tað vóru eisini tey, sum hildu, at føroyskir politikarar sum heild ikki eru nóg dugnaligir.

– Tá ið mál av stórum týdningi eru fyri á løgtingi, verður oftast farið út í smálutir, soleiðis at alt endar í einum ellubita – og einki kemur burtur úr. Í byrjanini vita politikarar ofta, hvat teir vilja við einum máli, men sum tíðin líður, endar alt í smálutum, soleiðis at endamálið við málinum fánar burtur – og at enda at kalla er gloymt burtur, siga keldurnar.

# Atlantic Navigator aftur í Ánunum



*Lagið var gott í Ánunum í morgun, tá ið myndamaðurin var fram við*

*Mynd: Bárður Lydersen*

**FISKIVINNA**
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í dag liggur flaggskip norðoyinga, Atlantic Navigator, í Ánunum og landar.

Seinastu tíðina hevur nógv virksemið verið í Ánunum, har havnalagið er gjørt so mikið klárt, at risatrolarin kundi leggja veiðina upp.

Í morgun var myndamaðurin, Bárður Lydersen, fram við og tók nakrar myndir fyri Sosialin.

Vit fara at venda aftur til Atlantic Navigator í blaðnum í morgin.